


www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 09 - 2011

# Íleggjaraprát í Kaffihúsinum

Mánadagin 12. september klokkan 15 skipar Virðisbrævamarknaður Føroya fyri almennum íleggjarafundi í Kaffihúsinum í Vágsbotni. Allir stjórarnir í teimum føroysku listaðu feløgunum koma at greiða frá teirra roknskapi fyri 2. ársfjórðing 2011 og harvið eisini fyrra hálvár 2011. Tað er Atlantic Airways, Atlantic Petroleum, Bakkafrost, BankNordik og Faroe Petroleum. Hetta er eitt upplagt høvi hjá øllum, sum eiga partabrøv ella sum umhugsa at keypa partabrøv í hesum feløgunum, at hoyra um gongdina hjá feløgunum og ikki minst høvi at hitta stjórarnar og seta teimum nærri spurningar. Skráin er - Klokkan 15 - 00 VMF bjóðar vælkomin Klokkan 15 - 05 Atlantic Airways leggur fram. Magni Arge, stjóri Klokkan 15 - 30 Faroe Petroleum leggur fram. Nils Sørensen, stjóri Klokkan 15 - 55 Atlantic Petroleum leggur fram. Ben Arabo, stjóri Klokkan 16 - 20 Kaffisteðgur Klokkan 16 - 40 BankNordik leggur fram. Janus Petersen, stjóri Klokkan 17 - 05 Bakkafrost leggur fram. Regin Jacobsen, stjóri Klokkan 17 - 30 Endi. Fundurin er almennur.